
# NAADE·OG·SANDHED
## — FOR UNGE OG GAMLE —

Naade og Sandhed er kommen ved Jesus Kristus. Joh. 1. 17.

Nr. 1. | JANUAR 1915. | 1. Aarg.

### Tiden er Livets Kapital,

### Til Læserne.

Hetta er fyrsta útgávan av "Naade og Sandhed", sum Arthur Brend og Daniel J. Danielsen stóðu fyri

*Tilskuere, saa meget mere, som det var de Mærkeligste Mennesker og den mest sjældne Natur, der blev fremstillet. Den 3dje Sammenkomst var til et Bibelsk Foredrag, holdt paa Færøsk, som saavel i Sprog som i Indhold var udmærket, ja næsten fængslende for Tilhørerne, om jeg saa maa sige.*

*Man benyttede til disse Sammenkomster det største Lokale man havde, og hver gang har det været stuende fuldt.*

*Man undlader ikke hermed at tilsende Missionær Danielsen en oprigtig Tak for den Beredvillighed og Umage, han udviste her og man ønsker ham Held og Lykke i hans fremtidige Virken.*

*Viderejde, den 21de Marts 1904 H.J.*

Á hesum sýningum sóust eisini, sum greitt er frá, myndir av fólki, sum hendurnar vóru høgdar av. Júst hetta var ímyndin av tí ræðuliga stýrinum hjá Leopold, soleiðis sum tað verður greitt frá í komandi greinir. Hesir fyrilestrar vaktu sum vera mann miklan ans millum fólk.


Poulina Danielsen av Hvítanesi var nógv á Viðareiði, og hon var vinkona Linu Danielsen. Her stendur hon í miðjuni. Tað eru frá verdóttir hennara Hervør Djurhuus, at vit hava fingið fleiri av myndunum til grein, og eru tær úr savninum hjá Poulinu. Til vinstru fyri hana er Jákup Frederik Fuglø, og til høgru Elspa dóttir hansara. Hon var gift við Jóan Jakku (Jacobsen) á Viðareiði. Frammanfyri síggja vit synir Elspu, og eru teir vist frá høgru Esmar, Mikal og Richard. Poulina var roknað fyri at vera eitt skila- og álitisfólk á Viðareiði

## Giftur við Linu

Daniel var í 1904 giftur við Linu, dóttir Cathrinu Henrikku f. Viderø av Viðareiði og Joen Niclasen av Skálatoftum. Tey vóru føroyingar, sum búðu í Leith. Lina var fødd 11. mai 1878. Hon fekk eitt vanligt kirkjuligt uppdragilsi. Hetta var tó ikki nóg mikið fyri hana, og hon varð umvend tann 7. november 1903. Hetta er beint eftir, at Daniel er komin heim úr Congo. Tað kundi bent á, at tað er í hesum sambandi, at tey bæði hittast.

Í Tey bygdu Land verður greitt frá, at Jógvan f. 1846 sum ungur slapp við skotskum línubáti, sum hann plagdi at fiska goggur fyri í Haraldssundi. Úrslitið er so, at hann og konan búsetast í Leith í Skotlandi. Sagt verður, at tað var vanligt at bretar veiddu við línu undir Føroyum hesa tíðina.

Jógvan er deyður, tá ið Lina var 17 ára gomul, og tá varð heimið upployst. Tey komu at flyta úr stað í stað.

Lina kom at arva eini hús á Viðareiði, og hesi gjørdust fyrsti fundarsalur hjá Brøðrasamkomuni í bygdini. Hesin fekk annars stólar frá gamla Sloans sali, sum í 1903 varð avloystur av Ebenezer.

Cathrina Henrikka átti eina systir, Elspa, sum giftist við einum Havnarmanni, ið æt Sakarias Poulsen. Tey búðu eisini í Leith og áttu børn. Tað kundi verið áhugavert, um nakar veit meira um hetta.

Foreldrini hjá teimum báðum systrunum vóru Elsebeth Simonsdatter og Simon Danielsen úr Miðstovuni á Viðareiði.


Arthur Brend, samstarvsfelagi hjá Dollanum

## Fyrsta ferðaorgul

Dollin og Lina komu at virka sum trúboðarar í Føroyum í 12 ár.

Lina hevði eina góða sangrødd. Hon sang og spældi á eitt ferðaorgil, sum Daniel hevði við sær úr Skotlandi. Kanska fyrsta ferðaorgul, sum var í Føroyum.

Daniel ferðaðist dúgliga kring landið. Gjøgnum skotska bíbliufelagið útvegar hann fólki bíligar danskar bíbliur.

Tað var ikki altíð, at fólk vóru so blíð, men hetta dugdi hann væl at taka. Einaferð segði Daniel við ein illan mann í eini bygd, har hann helt møti: "Oy, oy, eg havi sæð illari mann enn tygum í Afrika." Hann brátagnaði.

## Congo í Havn

Daniel búsettist í Havn. Hansara snotuliga, vælinnrættaða lítla hús – tey vóru tveyeini – og vælhildna urtagarð við Bines kilde, í dag Landavegur 54, var eitt hugnaligt stað at vitja inn til. Nógv vóru eisini tey, sum nutu gott av blíðskapinum hjá teimum báðum. Har var opin eldstaður sum í Bretlandi við skinnteppi frammanfyri og djúpum lenistólum. Veggirnir vóru umframt at vera prýddir við myndum, eisini prýddir við afrikanskum lutum sum bogar og pílar, summir við eituroddum, spjót og knívar, skjøldur og skinn av villum djórum, sum Daniel sjálvur hevði skotið. Aðrir lutir søgdu frá liviháttinum hjá fólkinum, og fleiri høvdu sína serstaka søgu.

Men hugnaligast var at vera savnað um orglið og lurta eftir og eisini at syngja við, tá ið Lina sang.



Hetta er eitt kort, sum Poulina hevur fingið frá Linu í 1914

## Bræv frá mammubeiggjanum

Daniel var sum sagt heilsubrekaður, tá ið hann kom til Føroyar orsakað av teirri malaria, hann fekk í Congo. Hann spardi seg kortini ikki í síni ferðing um landið, sum kundi vera stríggin tá í tíðini.

Um prædikuvirkisemið hjá Dollanum fara vit at endurgeva úr brævi sum mammubeiggin Daniel J. Danielsen, sýslumaður í Søldafirði, tann 4. mars 1912 skrivaði til William G. Sloan.

Her skrivar hann millum annað:

*"Min Søstersøn Daniel kom med sin Hustru hertil i Løverdags og agter at rejse med Postbaaden til Thorshavn i Morgen med Postbaaden.*

*Vi havde Forsamling her i Gaar Aftes, og der kom saa mange Folk, at baade Stuen og Kjøkkenet var fulde. Det var et herligt Møde og Daniel talte meget godt og klart om, hvad Jesus har gjort for os og om, at vi ved troen paa Ham faar Vished om, at vi ere frelste. Han taler altid paa vort eget Sprog, jeg tror at ulærde Folk forstaa det bedst.*

*I Aften var der atter Forsamling, men desværre var Vejret saa daarligt med megen stærk Regn, saa kun faa kom, men han talte meget smukt og folk hørte opmærksomt efter.*

*I Fuglefjord havde han ogsaa holdt møde, men der havde nogle raa og udannede Mennersker voldt Forstyrrelse".*